## HVAT ER FREMMAND FÍGGING?

Fremmand fígging er peningur, sum stavar aðrastaðni frá enn beinleiðis av játtanarlóg, og sum verður nýttur at fíggja partar av virksemi stovnsins. Peningurin kann verða veittur til ávíst endamál og sambært treytum, ið gevarin setur. Vanlig søla er ikki fremmand fígging.

## JÁTTANARLIG VIÐURSKIFTI, TÁ IÐ TALAN ER UM FREMMANDA FÍGGING

Meginregluliga kann almennur stovnur ikki átaka sær uppgávur/skyldur, sum verða fíggjaðar uttanífrá, uttan so at løgtingið er "vitandi" um tað. Tí skulu útreiðslur og inntøkur, ið standast av virksemi, sum verður fíggjað aðrastaðni, eisini verða tiknar við í fíggjarlógina og í raksturin hjá stovninum. Dømi um fremmanda fígging:

- **tilskot** - stovnur fær tilskot frá fyritøku ella grunni at keypa ávísan útbúnað
- **gávur** - persónur hevur testamenterað sína ogn til almennan stovn at nýta til ávíst endamál
- **granskingarstyrkur** - stovnur fær granskingarstyrk frá t.d. privatum grunni
- **peningur til ávísar verkætlanir** - stovnur fær studning frá t.d. Norðurlandaráðnum til verkætlan
- **peningur til ávís verkevni** - stovnur fær pening at skipa fyri t.d. ráðstevnu.

Útreiðslurnar av øllum virkseminum skulu førast í raksturin hjá stovninum, tá virksemið verður fíggjað við fremmandari fígging.

Talan kann eisini vera um annað enn peningaligar flytingar sum t.d., at stuðulsveitari letur vørur, løgur ella tænastur, ið verða nýttar sum partur í virksemi stovnsins. Í tílíkum føri skal verða sagt frá tí í viðmerkingunum til fíggjarlógina.

Áðrenn stovnur kann fara undir virksemi, sum verður fíggjað aðrastaðni frá enn av játtanarlóg, skal loyvi um tað fyriliggja frá Fíggjarmálaráðnum. Tó skal loyvi ikki fáast fyri at taka ímóti vanligum gávum, sum ikki hava bindingar við sær.

Verður farið undir virksemi, sum skal verða fíggjað aðrastaðni enn av játtanarlóg, og tað ikki var gjørligt at leggja upp fyri tí, tá ið fíggjarlógaruppskotið varð gjørt, nýtist landsstýrinum ikki at útvega eykajáttan til tess at heimila tílíkum virksemi.

Fær stovnur loyvi at umsita pening, ið stavar aðrastaðni frá enn av játtanarlóg, má viðkomandi aðalráð hava í huga, at fremmanda fíggingin ikki má broyta aðalmál stovnsins, sum lýst í teksti og viðmerkingum til fíggjarlógina. Fígging av t.d. útbúnaði eigur ikki at bera við sær eyka skyldur fyri stovnin.

Virksemi við fremmandari fígging skal hava egna undirkontu í fíggjarlógini. Virksemi, ið stavar frá vanligum gávum, skal tó ikki hava egna undirkontu.

## SÁTTMÁLAVIÐURSKIFTI

Sáttmáli um fremmanda fígging skal verða gjørdur millum gevara og stovnin og ikki millum gevara og einstaklingar á stovninum.

Er ivi, um fígging er veitt stovni ella einstaklingi á stovninum, má stovnsleiðarin taka støðu í hvørjum einstøkum føri. Ábyrgdast stovnurin ikki í sambandi við avtaluna um verkætlanina e.t., og ávísur persónur á stovninum hevur fingið peningin sum part í persónligum arbeiðsáhugamálum, skal tílíkur peningur haldast uttan fyri ábyrgdarøki stovnsins.

Stovnsleiðarin hevur ábyrgd av, at øll formlig og avtalurættarlig viðurskifti eru í lagi, og at tey eru avgreidd, áðrenn farið verður undir virksemið, ið fíggjað verður á henda hátt.

Tað, sum stovnur ognar sær við fremmandari fígging, er ogn stovnsins og ikki ogn hjá einstaklingi á stovninum.

Umsitið skal verða eftir teimum somu reglum, sum álagdar eru stovninum sambært játtanini í fíggjarlógini. Serligar treytir frá gevara, sum seta hesar reglur til viks, kunnu ikki verða góðtiknar.

**MEGINREGLUR FYRI VIÐGERÐ AV INNTØKU**

Fremmand fígging kann verða veitt til ávíst endamál. Vanligt er eisini, at peningurin verður veittur við m.a. teirri treyt, at hann ikki er ogn landskassans, fyrr enn ávísar treytir eru loknar.

Sambært § 13, stk. 6 í roknskaparkunngerðini frá 2007 er meginreglan, at inntøka skal skrásetast so hvørt, sum peningurin verður nýttur til ætlaða endamálið.

Stovnurin skal sjálvur tryggja, at inntøkurnar verða fluttar av fíggjarstøðuni til raksturin hjá stovninum.

**BÓKHALDSSPURNINGAR**

Til tess at hava greiðu á:

- hvørjar útreiðslur eru at rokna til ávíst virksemi t.d. eina verkætlan,
- hvussu samanhangurin er millum inntøkur og útreiðslur,
- grannskoðanarligum viðurskiftum, og
- hvussu peningurin er nýttur fyri at kunna gera roknskap til gevara

skulu inntøkur og útreiðslur verða skrásettar við tátti t.d. stað, endamáli ella verkætlan.

Tá ið endaliga uppgerðin verður gjørd, eiga at verða havdar í huga tær skyldur, sum fella seinni t.d. frítíðarískoyti. Eisini eigur stovnurin at avgreiða møguliga frítíðarløn og leggja upp fyri møguligum grannskoðanarútreiðslum.

Útreiðslur til vørur, tænastur og starvsfólk, ið verða brúkt bæði til vanliga og stuðulsfíggjaða virksemi stovnsins, skulu býtast lutfalsliga sambært hesi nýtslu.

Konta 0881 "Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.a.", sum verður nýtt í sambandi við ávíst endamál, skal verða gjørd upp uttan drál, eftir at endamálið formliga er lokið.

**KONTERINGAR**

**#1: Játtan frá stuðulsveitara**

Tá stuðulsveitari játtar stovni pening í sambandi við eina verkætlan, verður upphæddin bókað á fíggjarstøðuni sum áogn hjá stuðulsveitara og sum skylda til tann, sum skal fremja verkætlanina:

D: 0371 “Onnur áogn”
K: 0881 “Ikki inntøkuført – granskingarstyrkir, gávur o.a.”

**#2: Inngjald frá stuðulsveitara**

Peningur frá stuðulsveitara skal verða fluttur á kontu hjá Gjaldstovuni og verða mótbókaður áogn:

D: 0426 "Tøkur peningur"
K: 0371 "Onnur áogn"

Neyðugt er, at stovnurin frammanundan kunnar Gjaldstovuna um viðurskiftini, so Gjaldstovan kann avgreiða inngjaldið rætt.

Stovnurin ber sjálvur eitt møguligt tap, um stuðulsveitari ikki rindar avtalaðu upphæddina.

**#3: Inntøkuføring av fremmandari fígging**

Upphæddin verður heilt ella lutvíst inntøkuførd í raksturin hjá stovninum, tá ið fyritreytirnar eru loknar:

D: 0881 "Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.a."
K: 6390 "Flytingarinntøkur" ella 6520 “Flytingarinntøka úr útlandinum annars”

Fremmand fígging frá føroyskum gevara verður inntøkuførd á 6390, meðan fremmand fígging frá útlendskum gevara verður inntøkuførd á 6520.

Inntøkuførda upphæddin skal samsvara við tær viðkomandi útreiðslurnar, soleiðis at raksturin av tí, sum fremmanda fíggingin verður brúkt til, gevur 0.

**#4: Afturføring av óbrúktari játtan**

Um møguligt avlop av verkætlan fellur aftur til stuðulsveitara, er viðgerðin henda:

D: 0881 “Ikki inntøkuført – granskingarstyrkir, gávur o.a.”
K: 0371 “Onnur áogn”

**#5: Afturgjald av óbrúktum forútgjaldi**

Um møguligt avlop av verkætlan skal rindast aftur til stuðulsveitara, er viðgerðin henda:

D: 0881 "Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.a."
K: 0426 "Tøkur peningur"

Stovnurin gevur Gjaldstovuni eini gjaldsboð á oyðublaði EK 6.2.

**Dømi**

Niðanfyri verður víst eitt dømi, har stuðulsveitari játtar 1.000 tkr. og rindar 900 tkr., nýtslan og inntøkuføringin er 800 tkr., og restin verður afturførd og afturgoldin til stuðulsveitara:

| Dømi | 1xxx | 6390 | 0371 | 0426 | 0881 |
|---|---|---|---|---|---|
| #1 Játtan | | | 1.000 | | -1.000 |
| #2 Inngjald | | | -900 | 900 | |
| Nýtsla | 800 | | | -800 | |
| #3 Inntøkuføring | | -800 | | | 800 |
| #4 Afturføring av óbrúktari játtan | | | -200 | | 200 |
| #5 Afturgjald av óbrúktum forútgjaldi | | | 100 | -100 | |
| Tilsamans | 800 | -800 | 0 | 0 | 0 |

**Umsitingarkostnaður**

Í sambandi við verkætlanir er vanligt, at stovnurin tekur pening fyri at umsita verkætlanina. Umsitingarkostnaður er tað ískoytið, ið lagt verður aftur at tí beinleiðis kostnaðinum at svara fyri tann óbeinleiðis kostnaðin. Ongar reglur eru um, hvussu ein tílíkur umsitingarkostnaður verður roknaður út.

Umsitingarkostnaður kann bókhaldsliga verða viðgjørdur sambært hesum døminum:

| Strk | Útgr. | Kontuheiti | Verkætlan | Vanl. virksemi |
|---|---|---|---|---|
| 1479 | 2900 | Keyp av tænastuveitingum annars - overhead | D: 1.000 | |
| 2191 | 2900 | Onnur søla av tænastum, leigu og langtíðarleigu, privat - overhead | | K: 1.000 |

Hetta merkir, at vanligi rakstur stovnsins hevur eina inntøku, meðan verkætlanin hevur eina samsvarandi útreiðslu.

Føroya Gjaldstova

15. desember 2023